

# Psykadeliski hvalurin flagsaði

**Moby The Pink Pilot átti heiðurin at lata Flagsteltið upp á Summarfestivalinum 2009. Hetta komu teir fýra tónleikarnir bara heilt væl frá**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Bólkurin er eitt sindur løgin í sínum bygnaði, við syngjandi trummuleikaranum Fróða Hansen heilt frammi á pallinum.

Teltið var nærum tómt, tá bólkurin fór á pallin, og hetta tjaldið er kent fyri at vera vónleyst at ljóðblanda í, tá tað ikki er á tremur við fólki. Men onkursvegna hóskaði 70 ára kendi psykadeliski rokkurin hjá Moby the Pink Pilot serstakliga væl til umstøðurnar, runganin av teltinum gjørdi bara ljóðmyndina enn størri.

Bólkurin spælir væl, og innlivingin er heilt fantastisk. Eina løtu var hetta fínasta slag, men onkursvegna troyttaðis hesin ummælarin av løgunum, sum í sær sjálvum ikki høvdu nóg nógv uppá seg. Tað hjálpti tó nakað, at teir báðir Fróði Hansen og bassleikarin Petur Háberg skiftust um at syngja, hetta gjørdi tað nakað fjølbroyttari.

Bólkurin endaði við lagnum hjá Fróða Hansen, "Nobody Goes to Hell For Having Loved", ið hevur verið nakað at hoyrt í miðlunum seinastu tíðina, og hetta lagið var nokk mest fangandi lagið hjá bólkinum, tó uttan veruliga at lyfta upplivingina upp á tað støðið, ið kundi gjørt hana ordiliga góða. Eg ivist ikki í, at meira intimir karmar kundu gjørt upplivingina eitt sindur betur.



# Nik og Jay t

**Fólkaveitslan, ið Summarfestivalurin er, er nú ordiliga byrjað. Nik og Jay og teirra vinir tendraðu veitsluknøttin og hildu eina sanna poppveitslu á Vágsbø, har fólk sungu og dansaðu við til teirra lurtaravinarliga popp**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Heilt nógv fólk var komið saman framman fyri pallin, sum Nik og Jay inntóku sum høvuðsnavn hóskvøldið. Longu ein tíma áðrenn konsertina var ein rættiliga stórur flokkur av ungum gentum savnaður heilt frammanfyri pallin, og í ein tíma róptu tær eftir sínum hetjum. So tá teir báðir endiliga kom á pallin hungraði fjøldin eftir teimum. Henda hungur gjørdu teir sær dælt av og fólkaveitslan varð sett í gongd.

Sum kunngjørt áðrenn konsertina, hava Nik og Jay valt at skipa sínar framførslur eitt sindur øðrvísið enn áður. Tónleikararnir eru skiftir út við DJ Morten Breum, ið stýrir tónleikinum. Harafturat høvdu teir í besta Eminem stíl ein mann við sær, ið gekk runt á pallinum uttan ljóðføri ella mikrofon, og sum hevði til uppgávu at seta lív í fjøldina.

Eg havi ikki hoyrt teir við